# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*»Sonur mín kann ikki spæla fótbólt næsta árið«*

*Vaclav Cech, pápi at Petr Cech*

*Her síggja vit Hjørdis Johannesen og Biritu Joensen í sterka KÍF-blokkinum. KÍF vann kappingina hjá meistaradeild kvinnum eftir eina sera spennandi finalu, har tær máttu út í javnbrótara fyri at finna ein vinnara. Hetta er fyrstu ferð, at kvinnurnar hjá KÍF leika seg í steypafinaluna*



## Vinnarar kvinnur:

### Meistaradeild kvinnur: KÍF

Innleiðandi bólkur:

| | |
|---|---|
| KÍF – SÍ | 2-1 |
| KÍF – Dráttur | 2-1 |

Semifinala:

| | |
|---|---|
| KÍF – TB | 2-1 |

Finala:

| | |
|---|---|
| KÍF – SÍ | 3-2 (25-17, 25-21, 18-25, 13-25, 15-10) |

### 1. deild kvinnur: Fleyr



| | |
|---|---|
| Fleyr – SÍ | 2-0 |
| Fleyr – ÍF | 2-0 |
| Fleyr – KÍF | 2-0 |
| Fleyr – Mjølnir | 2-1 |

Hjá fyrstu deild vóru bert fimm feløg við, og tí var bert ein bólkur, har øll liðini spældu ímóti øllum.

### 2. deild kvinnur: KÍF b



| | |
|---|---|
| KÍFb – KÍFa | 2-0 |
| KÍFb – Fleyr | 2-1 |
| KÍFb – SÍ | 2-0 |

Hjá aðru deild vóru bert fýra lið, og tí var bert ein bólkur, har øll liðini spældu ímóti øllum

# Tveir av steypafin

**Tveir av steypafinalistunum í flogbólti blivu funnir sunnudagin, tá kvinnurnar hjá KÍF og menninir hjá Mjølnir vunnu FK-kappingina í Havn. Serliga kvinnufinalan gjørdist sera spennandi, og liðini máttu út í fimm sett, áðrenn vinnarin var funnin.**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Steypakappingin í flogbólti er ikki skipað, sum nógvar aðrar steypakappingar. Her er ikki talan um bólkaspæl ella Cup-system, sum avgerð, hvørji lið koma í finaluna. Í flogbólti vera spældar tvær kappingar, ein í Havn og ein í Klaksvík, har vinnararnir hjá bestu deildunum í báðum kappingunum møtast í steypafinaluni, sum verður spæld í februar mánað.

Fyrsta av hesum kappingum, tann sokallaða FK-kappingin, var á skránni í vikuskiftinum. Her kappaðust eldru deildirnar í flogbólti sínámillum.

Serliga bestu liðini hjá hvørjum felag gera nógv av til hesa kapping, tí tey kunnu vinna sær sæti í steypafinluni. Í nógv ár hevur steypafinalan verið størsta einstaka hending innan flogbólt árliga, og tí hevur tað stóran týdning hjá feløgunum at fáa sítt besta lið í finaluna.

### Fleyr og KÍF vunnu í 2. deild

Í 2. deild vóru bara 4 lið við hjá kvinnunum, tí at okkurt lið hevði givið avboð. Tí var gjørt av at hava ein bólk, har øll liðini spældu ímóti øllum. Her gjørdist KÍF a vinnari, og størstu mótstøðuna fingu tær frá Fleyr, sum eisini gjørdist nummar tvey í hesi deildini. Í næsta umfari møttust KÍF a og Fleyr í einum dysti, sum skuldi vísa seg at gerast avgerandi. Her vann KÍF 2-1, og tá tær vunnu tryggar sigrar í hinum báðum dystunum, so gjørdust tær vinnarar av 2. deild við fullum stigatali.

Hjá monnunum vóru fimm lið við í kappingini, og her var eisini gjørt av, at øll liðini skuldu leika ímóti øllum. Her gjørdist Fleyr a vinnari, og teir vunnu allar sínar dystir. Áðrenn síðsta umfar lógu Fleyr a og ÍF a á odda, og júst hesi liðini møttust í síðsta umfari. Her gjørdist Fleyr drúgvari og vann 2-1. Sostatt vunnu teir allar sínar dystir og gjørdust vinnarar av 2. deild hjá monnum.

### Fleyr var sterkast í 1. deild

Í 1. deild gjørdi Fleyr bart. Liðið úr høvuðsstaðnum vann bæði hjá kvinnum og monnum, og sostatt hevði Fleyr vunnið heili tríggjar deildir leygardagin.

Hjá monnunum góvu fleiri lið avboð, og til síðst vóru bara tvey lið eftir. Tey vóru Fleyr og Mjølnir, og fyrireikararnir gjørdu av bert at leika ein dyst, har vinnarin samstundis gjørdist vinnari av FK-kappingini. Hetta gjørdist ein javnur dystur, har liðini byrjaðu við at vinna hvør sítt sett. So máttu liðini út í ein avgerandi javnbrótara, og her vann Fleyr. Sostatt endaði dysturin 2-1 til næstbesta liðið hjá Fleyr, og samstundis gjørdust teir vinnarar av FK-kappingini.

Hjá kvinnunum gjørdist kappingin heldur meir spennandi, tí her vóru fimm lið við í kappingini. Eisini her gjørdist Fleyr vinnari. Tær vunnu tryggar 2-0 sigrar í trimum teimum fyrstu dystunum, og so var bara Mjølnir eftir á skránni í einum